# Føroya størsta útstykking liðug

**Hátíðarhald var í Hoyvíkshaganum mánadagin, tá útstykkingin Hoyvíkshagi Suður var avhendað Tórshavnar býráð. Talan er um Føroya størstu útstykking, og væntast kann, at umleið 700 fólk fara at búleikast har**

ÚTSTYKKING
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

*Myndir: Jens Kristian Vang Magnus Gunnarsson*



*Formaðurin í byggi- og býarskipanarnevndini, Jógvan Arge, og borgarstjórin í Tórshavnar kommunu, Heðin Mortensen, sum klipti snórin*

Mánadagin 13. juni 2005 var hátíðarhald í Hoyvíkshaganum í samband við at størsta útstykkingin í Føroyum nakrantíð, Hoyvíkshagi Suður, var avhendað Tórshavnar býráð.

Í einum arbeiðsskúri á vegamótinum Rólantsgøta/Karlamagnusarbreyt skrivaði borgarstjórin Heðin Mortensen undir avhendingarskjalið.

Síðan flutti formaðurin í byggi- og býarskipanarnevndini Jógvan Arge fram røðu. Hann segði m.a. at alsamt vaksandi trýstið á at fáa bústaðir í høvuðsstaðnum førdi við sær, at Tórshavnar kommuna fyri umleið trimum árum síðani fór undir at planleggja arbeiðið at gera størstu útstykking í Føroyum nakrantíð í Hoyvíkshaganum. Farið var undir anleggsarbeiðið fyrst í 2003. Útstykkingin Hoyvíkshagi Suður er ein framsøkin ætlan. Hann nevndi eisini at í útstykkingini eru møguleikar fyri 175 bústøðum – av teimum verða 40 samanbygd hús. Vegalongdin í sjálvari útstykkingini er 2,5 km, gongubreytirnar eru 4,8 km, gøturnar 630 metrar, parkeringsplássini 140 í tali og til alt hetta eru brúktir 50.000 rúmmetrar av asfalti. At enda takkaði Jógvan øllum teimum, sum hava staðið fyri arbeiðinum.

Eftir tað klipti býráðsformaðurin snórin, og fyrsti bilur koyrdi inn á útstykkingina.

Væntast kann, at umleið 700 fólk fara at búleikast á hesum øki. Arbeiðið er gjørt í samtaki millum byggifeløgini p/f Byggitek og J&K Petersen Contractors. Undirarbeiðstakarar hava t.d. verið Fjarhitafelagið, SEV og Føroya Tele. Ráðgevararnar hava verið sp/f Verkfrøðingastovuna og p/f Sofus M. Jakobsen. Vagn Nielsen hevur havt byggiharraleiðsluna um hendi.



*Fyrsti bilurin, ein Toyota Avensis við nevndarlimunum í eigarafelagnum, koyrir inn á útstykkingina, eftir at snórurun varð kliptur*



*Heðin Mortensen, borgarstjóri, skrivar undir avhendingarskjalið saman við Ragnhild Petersen, frá J&K Petersen Contractors, og Tummas Sørensen frá p/f Byggitek*



*Nevndin í eigarafelagnum Hoyvíkshagi Suður, f.v.: Rúni Leitisstein, formaður, Árni Rasmussen, næstformaður, Ása Andreassen, skrivari, og Andreas Mouritsen, kassameistari. Petur Olsen, nevndarlimur, vantar á myndini.*